# Stórt serblað um bilar í Sosialinum leygardagin

**Leygardagin 9. oktober verður eitt stórt serblað um bilar í Sosialinum við hópin av spennandi tilfari. Í blaðnum eru nógvar myndir og greinar við øllum tí nýggjasta innan bilar og bilvinnugreinina**

BILBLAÐ

Í blaðnum "Bilar" eru t.d. greinar um fleiri nýggjar bilar sum koma á marknaðin í heyst og í vetur, royndarkoyringar av nýggjum bilum, um nýggjastu billyktirnar sum gera nátt til dag og um RFT-dekkini, sum kunnu koyra hóast tey eru punkteraði.

Eisini eru góð ráð til vetrarkoyring, nógv tilfar um ferðslutrygd og viðlíkahald av bilum.

Ein grein er um ein kendan italskan bildesignara, áhugavert tilfar um føroyskar bilfyritøkur og bilatorg við hópin av brúktum bilum.




*Serblaðið "Bilar" við hópin av spennandi tilfari verður í Sosialinum leygardagin 9. oktober*

Eystara Bryggja · P.O. Box 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf 34 59 60 · Fax 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK

tak tað róligt!
...lat okkum tollavgreiða
vøruna fyri teg!

Vit taka okkum ikki bert av flutninginum,
men kunnu eisini tollavgreiða vøruna.

HIN FØROYSKA FARMALOYSNIN



SKJÓTLEIKI | TRYGGLEIKI | FØRLEIKI | SMIDLEIKI

Um tú ynskir tað, kunnu vit fáa allar vørur tollavgreiddar fyri teg, so tú kanst nýta tíð tína meira skynsamt.

Skalt tú flyta vøru í smærri eindum til ella úr Føroyum, ella ætlar tú tær at flyta stóran og tungan farm, so heitið á okkum.

Nútímans flutnings- og hjálpitól, serkøn fólk, ið duga at handfara og flyta farm á lagaligan hátt og áralangar royndir innan farmaflutning, er tín besta trygd fyri, at farmurin verður útflýggjaður móttakaranum, júst sum vit fingu hann.

Í Danmark hava vit farmastøðir í Kolding, Hedehusene og Hanstholm. Tú kanst lata vøruna inn í Hanstholm leygardag, so hon verður í Tórshavn longu mánamorgun.

Okkara styrki...

- bóking á fráfaringardegnum
- stuttar innlatingarfreistir
- útgerð til allan farm
- flyta køli- frysti- og turrlastir
- tollavgreiðsla fyri kundan
- kappingarførir prísir
- høgt tænastustøði
- stutt transittíð

trygt, skjótt, lætt og gott...
...Smyril Line Cargo – SKILAGOTT

# Feitt Live kvøld í Margarinfabrikkini

TÍÐINDASKRIV

Enn einaferð lata ART og Spren rex í felag dyrnar upp á Margarinfabrikkini.

Hesuferð við eini Rock The Palace live konsert við trimum av teim bestu mest hartsláandi undirgrundsbólkunum í landinum, nevniliga onkikanndiskuterast.altkann, Lama Sea og 48 Pages. Allir bólkar sum eru kendir fyri at sparka r....

Tað er ikki so langt síðani at teir báðir fyrstu bólkarnir spældu á MF,við eini dundrandi succes. Eftir nógvar áheitanir og støðugan ágang verða teir so aftur at hoyra saman við Babypunkarunum burturav 48 Pages,sum hava gjørt seg sera galdandi á pallinum seinastu tíðina.

Onkikanndiskuterast.altkann, hava lova eina ørðvísi konsert,við tað at teir fyri eina ferð skyld ,kanska, eru fullmannaðir, hóast teirra eyðkenni er, at teir við teirra púra øra og øsandi blanding av blues og heavyrokki, klára at blæsa takið av líkamikið um teir eru tríggir ella seks manns.

Lam Sea eru í toppform og teir fara at skríggja og skrála seg út um pallkantin. Teir spæla teirra egna bland av góðum nýggjari funky poppi,sum teir tó leggja eitt sindur á hylina,hetta kvøldið,og so einum slagið av Led Zeppelinaktigum tónum.

Special Guest hetta kvøldið eru 48 Pages, kanska tann allarmest punkuti bólkurin í dag.Teir halda seg ikki hava funnið nøkur mørk enn so teir spæla sum tað passar teimum.

Alt í alt kann roknast við at hetta verður ein av teim allarfeitastu konsertunum her á Føroya landi í ár. Tónleikurin er sjálvandi, sum altíð, originalur føroyskur tónleikur til eitthvørt oyra sum hoyra vil.



Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

Bilar

Nr. 191 • hósdagur • 7. oktober 2004 • 78. árg.

# Mazda6 MPS við 260 hk



*Mazda koma nú við teirra mest sportsliga sedan nakrantíð. Talan er um Mazda6 MPS við 2,3 litur motori og 260 hk.*

**Mazda koma nú við teirra mest sportsliga sedan nakrantíð. Talan er um Mazda6 MPS við 2,3 litur motori og 260 hk. Bilurin kemur á føroyska og danska marknaðin komandi summar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mazda6, sum er ein sera væl umtóktur bilur, kemur nú í eini sportsligari útgávu við 2,3 litur motori við 260 hk og permanentari fýrahjólrdrift. Bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á umleið 6 sekund, og toppferðin er 240 km/t.

Undirvognurin er strammaður upp, so bilurin hevur fast vegtak og framúr góðar og sportsligar koyrieginleikar.

Mazda6 MPS sær eisini sportsligur út við meira opnum kølaragittari, spoilarum og 18" aluminiumsfelgum, sum eru designaðar til bilin. Eisini innan hevur bilurin t.d. sportssetur, sum stuðla sera væl við nógvari ferð í svingum.

Mazda6 MPS kemur á føroyska og danska marknaðin komandi summar.

*Kelda: Mazda Motor Danmark*



*Aftan eru ørðvísi sportsligar lyktir, spoilarar og dupult útstoyt. 18" aluminiumsfelgurnar eru designaðar til hendan bilin*

# Skoda Roomster í 2006

**Konseptbilurin Skoda Roomster varð fyrstu ferð alment sýndur fram á Frankfurt Motorshow í fjør sum ein minivan. Bilurin verður eftir ætlan veruleiki í 2006**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Skoda Roomster verður ein rættuliga sermerktur bilur, sum verður bygdur ein felags Skoda/VW plattform.

Designið er smart, og bilurin verður praktiskur og familjuvinarligur.

Roomster hevur 5 hurðar og kann lættliga gerast um til vøruvogn. Innrættingin verður sera liðilig, t.d. kunnu baksetrini flytast heilar 75 cm aftur og fram.

Bilurin verður stuttur og breiður, umleið 4 metrar langur og yvir 180 cm breiður.



*Skoda Roomster verður ein rættuliga sermerktur bilur, sum eftir ætlan kemur á marknaðin í 2006*

## Suzuki motorar í Kina



Suzuki setur enn eina motorverksmiðju í upp í Kina, sum skal framleiða ein framkomnan 1,25 litur dieselmotor, sum Fiat hevur gjørt. Ætlanin er at framleiða 250.000 motorar árliga. Fiat hava tekniskt og økonomiskt samstarv tið General Motors, sum eiga 20 prosent av Suzuki

*Kelda: Motor Magasinet*

## Prius framleiðast í Kina



Toyota hava gjørt av, at Prius eisini skal framleiðast í Kina frá síðst í 2005. Annars hava Ford í USA keypt loyvi frá Toyota til at framleiða teirra hybrid-konsept við el- og bensinmotori til egna framleiðslu

*Kelda: Motor Magasinet*

## Honda V6 Hybrid



Honda eru á veg á marknaðin við einum Accord við V6 hybridmotori. Talan verður um heimsins fyrsta V6 hybridbil. Bilurin kemur á japanska og síðan á amerikanska marknaðin. Honda hava annars eisini ein annan hybridbil, Honda Insight

*Kelda: Motor Magasinet*